# ð aftur í Føroyum í 57 ár

## PKU ("Føllings-sjúkan")

Av 10.000 børnum, sum verða fødd í Danmark, er eitt barn, sum ikki kann drekka mjólk, eta kjøt, egg, fisk og aðrar proteinríkar matvørur.

Hvørt ár verða soleiðis 5-6 børn fødd í Danmark, sum hava arvaligu stoffskiftissjúkuna, PKU, sum eisini verður rópt "Føllings-sjúka" eftir norska læknanum, Asbjørn Følling, sum staðfesti hesa sjúku í 1934.

Sum skilst, er lutfallið av hesi sjúku eftir fólkatalinum á leið tað sama í Føroyum sum eitt nú í Danmark.

Børn, sum eru fødd við PKU, eru í allar mátar ment sum onnur børn, tá ið tey verða fødd, men tey kunnu ikki í sama mun sum onnur "umgera" lívsneyðugu aminosýruna, phenylalanin til eina aðra aminosýru, tyrosin, sum likamið ger, tá ið alt er, sum tað eigur at vera.

Sleppur phenylalanin at veksa í likaminum samstundis sum tørvur verður á tyrosin – og eingin viðgerð verður givin, gongur hetta út yvir nervaskipanin longu tey fyrstu árini hjá einum barni. Tað er tí ógvuliga týdningarmikið beinanvegin at avmarka nøgdirnar av phenylalanin, soleiðis at heilin ikki verður skaddur.

Tí má ansast væl eftir, hvat eitt barn, sum hevur "føllings-sjúkuna", etir.

ovfarin av, at hann sær so gott úr, nú hann vitjaði okkum her heima, sigur familjan.

Tað skilst á Solveig, at hon er ógvuliga góð við Erling, og hon dylir ikki fyri at siga, at hon verður løgd "undir" at hava eitt serstakt hjarta fyri honum.

- Eg haldi, at Erling dugir at skyna á, hvønn hann hevur við at gera í tí dagliga – og eg haldi eisini, at vit merkja, hvønn honum dámar best at hava sær til hjálpar.

Solveig heldur ikki, at hann hevur góð eygu, men hoyrnin er so nøkulunda.

- Eg haldi, at vit skilja, hvat hann meinar við, tá ið hann gevur "tekin" – um enn tey eru fá, og eg haldi eisini, vit skilja hann, tá ið hann eitt nú ikki tímir at verða nortin meira.

Tað er nevniliga soleiðis, sigur Solveig, at húðin á einum persóni við "føll-ings-sjúku" kann vera ógvuliga sárbar.

### Í koyristóli

Hon sigur, at í 1994 fekk Erling eitt bakkast og endaði í koyristóli. Síðan hevur hann ikki verið førur fyri at ganga.

- Nú vit fingu møguleikan at koma upp til Føroya við honum, hildu vit, at skuldi tað vera - ja, so skuldi tað vera nú.



*Solveig Henriksen og Lene Vollesen vóru í Føroyum við Erlingi. Hetta er fyrstu ferð, hann vitjar aftur í Føroyum – í 57 ár*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Hon sigur, at tey trý komu við flogfari og fara hiðani aftur við flogfari.

- Vit høvdu koyristólin í viðførisrúminum á flogfarinum, og síðan hava vit havt koyristólin í bilinum, tá ið vit hava koyrt her í Føroyum.

Hon sigur, at tær hava fingið góða hjálp á ferðini, og systkini hjá Erlingi og onnur hava verið teimum trúføst, tá ið neyðugt hevur verið at tikið eina hond í.

- Familjan í Føroyum gleddi seg nógv til ferðina hjá Erlingi og vit, sum taka okkum av honum í Danmark, eru fegin um at hava hitt fleiri av hansara nærmastu og hava sæð umhvørvið og barnaheimið, sum var hansara øll barnaárini.

Sjálv kallar Solveig seg "omsorgsmedhjælper", og áhugavert var at síggja, hvussu væl hon einsamøll megnaði at fáa Erling, sum vigar 82 kilo, upp úr koyristólinum og inn á setrið í bilinum, tá ið tey fóru av Hotel Runavíkar Sjómansheimi týsdagin.

- Erling hevur ikki kunnað tosað øll hesi árini, eg havi kent hann og verið um hann, sigur Solveig.

Meðan beinini eru rættiliga lamin, er hann betur fyri við ørmunum.

- Stinga vit gaffilin í ein breyðbita, fær hann sjálvur bitan upp í munnin. Annars er hann í allar mátar óhjálpin, sigur Solveig Henriksen at enda.



*Tað er ikki bara sum at siga tað at skula lyfta ein mann, sum vigar 82 kilo, upp úr koyristólinum og inn í bilin, men hetta stóð ikki á hjá Solveig, sum hevur verið um Erling síðan 1989*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*